hvor vi spiste til Middag og om Aftenen var Onkel Chr., Fru Hoffman og Edith ogsaa hos Bedstemoder. De spillede Brigh, mens Bedstemoder og jeg var Tilskuere, naar vi ikke læste Avisen.

### 4. December

Da jeg havde spist Frokost tog Onkel Chr. og jeg ud paa Vanføre-hjemmet, hvor jeg blev under-søgt. De sagde, at jeg maatte have en Bandage, men at det kunde være undgaaet, hvis jeg var kommet ned i Tide. De sagde, at det absolut var en gammel Skade. Siden blev min Ryg gipset. Det var alt andet end behageligt. De mente, at jeg nok kunde faa Bandagen om 8 Dages Tid.

Da vi kom hjem igen var klokken bleven godt fem. Vi havde altsaa været derude i godt 4 Timer. Vi spiste saa til Middag. Siden spillede Edith og Fru Hoffman skiftevis paa Klaver for os. Jeg gik tidligt i Seng kl. 9.

### 5. December

Da jeg havde spist Frokost, talte jeg i Telefon med Ove. Han havde meget travlt i disse Dage, da Vesta jo snart skulde op igen til Færøerne. Og saa maatte han ogsaa trave en del rundt med Bager Frants Restorff. (Teir vóru systkinabørn. Frants er fyri kortum umrøddur í røðini Hendur ið Sleptu. Hevði millum annað verið kokkur hjá konginum í Siam.)

Om Eftermiddagen sad jeg inde paa Badeanstalten Kjøbenhavn med Onkel Chr. Vi fik russisk Bad. Jeg blev vejet og vejede 102 pund nøgen. Da vi nu kom hjem spiste vi Middag. Efter Middagen læste jeg lidt i Aviserne og gik siden i Seng Kl. godt 9.

### Dagar í Keypmannahavn

Soleiðis ganga dagarnir. Tann 6. fer Egil fyrstu ferð í býin einsamallur. Hann fer ein túr oman og niðan eftir Vesterbrodgade. Hann tekur sporvogn út til ommu sína og klárar eisini at skifta frá einum sporvogni til ein annan. Hann vitjar nógv fólk, og hendan dagin vitjar hann Kristoffer Lützen, sum býr tætt við ommuna. Hann var nógv upptikin at lesa til próvtøku. Kristoffur var yngsti sonur Nichels, og bleiv kendur sum ein strangur lærari við realskúlan í Havn.

Seinni vitjar hann Sannu Niclassen.

Tann 10. Desember fer Egil tíðliga upp. Hann skal saman við Ova umborð á Vesta, sum er komin úr Føroyum. Aftaná fara teir umborð




*Um hesa tíðina, Egil var í Keypmannahavn, vóru uppreistartíðir um alt Europa. Her roynir danska løgreglan at steðga eini syndikalistiskari kravgongu uttan fyri Børsen í Keypmannahavn*

á Constance. Her hittu teir Effe hjá Margrethu og Jens Mohr.

Effe (Peter Even) fór blað-ungur heimanifrá at arbeiða á skrivstovuni hjá einum mammubeiggja í Hull, Kristian Evensen, kendur sum reiðari.

Tað tímdi hann kortini ikki, og hann fór út at sigla. Men hann fór síðan á kokkaskúla í Keypmannahavn, og tá er tað, at hann hittir Egil.

Í 1918 fór hann aftur at sigla. Hann fór til USA og sigldi sum hovmeistari har í 14 ár. Hann fekk eisini amerikanskan borgararætt. Í 1933 fer Effe at sigla við Tjaldr-inum sum hovmeistari. Her kom hann soleiðis fyri, at tá Danmark varð hersett av Týsklandi í 1940, var han staddur í Føroyum, meðan konan og døturnar vóru staddar í Danmark, og tey sóust ikki aftur fyrr enn kríggið var av.

Ein dóttir hansara er annars Bysse (Brynhild) gift við Tormóð Djurhuus. Tey eiga eisini ein Peter Even.

### Fekk stóra umsorgan

Tað má sigast, at Egil hevur notið stóra umsorgan í Keyp-mannahavn. Tann 11. Desember var hann saman við Ove og Edith í kongaliga teatrinum, har tey sóu Genboerne. Síðan fóru tey á fínu matstovuna Wivel at fáa sær ein bita.

Tann 12. fer hann so út á Van-førehjemmet at fáa bandaguna.

(Tað tykist at vera tvær Edith. Kona Ova og dóttir mammu-beiggjan Chr. sum hann skrivar hann. Helst eitur hann Christian ella Christoffer.)

Tann 19. Desember var hann í Raadhusstræde, har hann ætlaði at heilsa uppá fólkatingsmannin, men hitti hann tíverri ikki. (Edvard Mitens var fólkatingsmaður tá.)

Tann 21. desember vóru Egil og Chr. heima hjá Carl Bergh, sum var giftur við Helene, dóttir gamla Restorff. Greitt verður frá henni í Ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum. Hon var omma Estrid Bannister, sum var "modellið" av Barbaru í bókini hjá Jørgens Frants Jacob-sen. Egil var fleiri ferðir heima hjá teimum.

Tann 22. ætlaði Egil sær at heilsa uppá Rikard Long, seinni kendur sum realskúlalærari og landsstýrismaður, men hann var ikki heima.

Jólaaftan vóru Egil og Chr. í Vor Frue Kirke til eina tónleikaguds-tænastu. Aftaná fóru teir heim til Edith, sum hevði pyntað eitt jólatræ. Táið tey høvdu dansað um træið eina løtu høvdu tey eitt jólaborð.

Áðrenn tey fóru heim spældi mamman klaver eina løtu.

2. jóladag fór Egil í Føroy-ingafelag, sum vanliga hevði eina samkomu hendan dagin. Har heilsaði hann uppá fleiri føroyingar, men helt annars ikki at tað var so áhugavert.

Bagefter tog jeg til Rådhus-pladsen, hvor jeg skulde mødes sammen med Gunnar Mortensen. Vi var saa lidt paa "sjov" sammen (hm).

### Nýggjársaftan

Hendan dagin er Egil aftur saman við Edith og Ove. Fyrst fara tey í Zoologiska havan. Har vóru tey ein tíma og fóru so inn á eina kafé at drekka kaffi.

Síðan fóru tey í ballet í Palads-teatrinum. Kl. 10 fóru tey út at eta, so tey endaðu gamla árið við at eta, og byrjaðu tað nýggja vit at drekka champagnu. Tað var musikkur, og tey hildu á til hálvgum átta á morgni. Tá var framvegis veitsla í øllum býnum.

### Nýggjársdagur

Til trods for, at vi kom saa sent hjem, eller tidlig i en Forstand, maatte jeg dog være oppe til Frokost kl. 12, thi ellers ville onkel Chr. sikkert have været gnaven, men jeg fik mig ogsaa en Generallur oven paa Frokosten.

Om Eftermiddagen kørte jeg ud til Bedstemoder. Ove kørte ogsaa med den Vej. Han havde nemlig været hjemme hos mig, hvor vi fik en god Passiar tilmed en god Kop Kaffe fra Julia ( helst kona mammubeiggjan). Om Aften kom Onkel Chr., Fru Hofmann, Edith og Moder ogsaa ud til Bedstemoder. De spillede Brigh, mens Bedste-moder og jeg var Tilskuere.

Vi tog Hjem Kl. henved 12. Jeg sad og halvsov hele Tiden derinde, men jeg var selvfølgelig nødt til holde Øjnene aabne, mens vi kørte hjem. "Edith mundi ikki vera stórt frægari enn eg."

Tann 4. januar vóru Egil og Ove umborð á Tjaldrinum við nøkrum pakkum, sum hovmeistarin skuldu taka sær av.

Vóru 8. januar hjá Carl Berg og fingu at vita, at postur var komin úr Føroyum.

### Stuttleiki og skaði í Klampenborg

### 14. januar

Da jeg havde spist Frokost, tog Edith og jeg hen til Banegaarden, hvor vi skulde mødes med Ove. Vi tre tog saa med Toget til Klampenborg. Der var overmaade mange Mennesker og megen Trafik. Vi spadserede saa hen i Ulvedalen, hvor en hel masse Mennesker kælkede. Mens vi var derude kom fem Mennesker til skade, og senere kom der tre til skade.

Síðan fóru tey heim til ommuna at fáa døgurða.

### Nú á Sanatorium

Eftir at hava havt lív og góðar dagar i Keypmannahavn fær Egil bræv um, at hann skal møta á Sanatoriinum tann 3. Februar. Hetta gjørdi hann í ringum lag. Tann 31. januar er hann og heilsar uppá hoffotografin Elfelht. Teir munnu hava kenst.

Hendan dagin eta vinirnir døgurða saman í samband við at Egil skal fara. Og nú byrjar ein trupul tíð hjá Egil, sum kann sigast at vera byrjanin til endan hjá honum.

Hann skrivar:

Onkel Chr. vækkede mig kl. godt 7, da han jo vidste, at "eg fór at pjaka nakað leingi." Kl. 10.20 skulde Toget tage af sted. Jeg skulde skifte i Næstved. Onkel Chr. og jeg tog hen til Banegaarden allerede kl. godt 9, hvor fru Hofmann, Edith, Moder og Ove allerede var kommet for at sige mig Farvel. Vi skulde have drukket Kaffe inde paa Jernbanerestauranten, men da jeg ikke vilde have noget, vilde de andre heller ikke. Jeg var i hele tager i meget skidt humør "í grúiliga ringum lagi."

Jeg var nemlig meget ked af, at der ingen skulde være, som havde saa megen Tid tilovers til at køre mig til Præstø. Ove var jo lovlig undskyldt, da hans søster Borghild skulde giftes om Aftenen. (Hon giftist við keypmanninum Harald Fischer í Korsør.)

Jeg klarede mig imidlertid meget bedre alene end jeg havde troet, da det var første gang jeg kørte i Tog.

**Komandi partur**

Í komandi parti er Egil á Sanatorium, har tað vóru nógvir trupulleikar. Hann kemur so aftur til Føroya, men gerst bert sjúkari og sjúkari

Sosialurin